# Sparikassin keypt 25 prosent av Ejendomsvækst




*Marner Jacobsen, stjóri í Føroya Sparikassa, hevur staðið á odda fyri arbeiðinum at keypa partabrøvini í Ejendomsvækst*

**Á tíðindafundi í høvuðsskrivstovuni hjá Føroya Sparikassa kunngjørdi Marner Jacobsen, stjóri í Sparikassanum, at bankin hevur keypt 25% av fyritøkuni Ejendomsvækst A/S**

BANKI
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

– Hetta er ein týðandi liður í vakstrar- og váðaspjaðingaætlanini hjá Føroya Sparikassa, segði Marner Jacobsen í morgun.

– Við hesum keypinum føra vit nakrar av teimum ætlanunum, sum vit hava sett okkum út í lívið. Keypið varð fullført 15 mai. Føroya Sparikassi keypir 25% og hevur ein optión uppá 10% afturat.

### Heimliga kappingin hørð

Føroya Sparikassi staðfestir, at kappingin í Føroyum er sera hørð, og tað er tí torført at økja um marknaðarpartin og inntøkurnar í Føroyum. Føroya Banki hevur framt nógvar rationaliseringar, og teir eru nøgdir við teirra marknaðarpart í Føroyum.

– Okkara mál er nú at koma út á ein størri marknað. Danmark hevur ein stóran marknað, og tí undrar tað meg, at føroyingar ikki troyta hann meira, sigur Marner Jacobsen.

– Øll tosa um EFTA og ES, men tað er upplagt, at vit keypa okkum inn í tann danska marknaðin.

Málið hjá Føroya Sparikassa er, at í 2006 skulu meira enn helvtin av inntøkum bankans verða uttanlands. Í 2005 komu 1/3 av inntøkum bankans frá uttan fyri Føroyar. Við hesum keypinum og væntaða yvirskotsvøkstrinum hjá Eik Bank, sum er dótturbanki hjá Føroya Sparikassi, vænta teir, at málið verður rokkið í ár.

### Fastognarvirksemi

Ejendomsvækst A/S bjóðar ráðgeving til íløgur í fastogn. Felagið arbeiðir í nógvum londum. Fastognarvirksemið, sum felagið fæst við, vinnur meira og meira fram í Evropa. Handlar og fyritøkur hava ikki longur so stóran áhuga í at eiga stórar bygningar. Tær vilja heldur leiga seg inn. Arbeiðs- og sølumarknaðurin er í støðugari menning, og tí er neyðugt, at fyritøkurnar eru fleksiblar og dynamiskar. Tí velja tær ofta at leiga høli heldur enn at keypa.

Ejendomsvækst A/S leggur dent á at fáa sterkar leigarar og langar leiguavtalur. Tað verður ikki hugsað so nógv um eina virðisøkin av fastognini, men íløgan skal geva eitt yvirskot yvir eitt ávíst áramál.

### Yvirskotsfelag

Felagið fekk eitt ársúrslit uppá 90 milliónir í 2005, og væntandi verður yvirskotið enn størri í 2006.

– Hetta er eitt felag í vøkstri, og tað passar væl til okkara filosofi. Vit vænta okkum nógv gott burturúr samstarvinum, sigur Marner Jacobsen.




